Strandfaraskip Landins sóknast eftir

# Skuldararøktara

*Av tí at skuldararøktari okkara hevur sagt seg úr starvi, verður hetta starvið hervið lýst leyst at seta skjótast gjørligt.*

sansir.fo

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar eru:
- Avstemming og innkrevjing av skuldarum
- Bóking og avstemming av ferðaseðlasølu
- Inntøpping og bóking av fakturum og kreditnotum
- Avstemming av kassakontum
- Fyrisiting og menning av mannagongdum í samband við fakturering, inntøkuskráseting og skuldarapolitikkinum

Tá ið tað er neyðugt, kemur tú eisini í ein ávísan mun at røkja aðrar uppgávur á Fíggjardeildini.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- hevur HH-, skrivstovu- ella líknandi útbúgving.
- hevur kunnleika og royndir í Navision fíggjarstýringsskipanini
- hevur kunnleika og royndir innan KT á brúkarastigi
- megnar at arbeiða sjálvstøðugt og dugir at samstarva
- hevur góð evni at orða teg skrivliga og munnliga
- at tú hevur góðan røkjuskap

**Fíggjardeildin**
Høvuðsuppgávan hjá Fíggjardeildini er at veita leiðsluni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna fíggjarstýringina hjá fyritøkuni.

Aðrar uppgávur eru:
- Fyriskiping av roknskaparverkinum
- Uppseting av fíggjarætlanunum
- Játtanareftirlit
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Innkeyps- og goymslustýring
- Lønarfyrisiting

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og er lønt í lønarflokki 4. Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, lívsrensli og tilvísingum skulu sendast til:
Strandfaraskip Landsins
Stílað: Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn
og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. apríl 2007 kl. 12.00.
Til ber eisini at senda umsóknina til t-post: pah@ssl.fo.

Um tú ynskir nærri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jógvan Rubeksem, virkandi fíggjarleiðara á tlf. 543021 ella t-post: jor@ssl.fo ella Niels Juel Arge, virkandi stjóra á tlf. 543011 ella t-post: nja@ssl.fo.

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landsins sóknast eftir

# Leiðsluskrivara

*Av tí at leiðsluskrivari okkara hevur sagt seg úr starvi, verður hetta starvið hervið lýst leyst at seta skjótast gjørligt.*

sansir.fo

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá leiðsluskrivaranum eru at:
- Avgreiða mál vegna stjóra og leiðslu
- Stýra og umsita journal (Doculive), kundamóttøku, postmóttøku og samskifti annars
- Avgreiða telefon, kalendara, fundir og vitjanir
- Umsita búnar

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú
- hevur HH-, skrivstovu- ella líknandi útbúgving
- hevur royndir innan tænastu og fyrisiting
- hevur kunnleika og royndir innan KT á brúkarastigi
- hevur góð evni at orða teg skrivliga og munnliga á føroyskum og norðurlendskum
- arbeiðir sjálvstøðugt og málrættað
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevni
- ert álítandi og hevur góðan røkjuskap

**Stjóraskrivstovan**
Stjórin á SSL hevur ovastu leiðsluna og umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av virksemi stovnsins. Ábyrgdarøkið fevnir eisini um langtíðarráðlegging við ábyrgd fyri samskiping av ymsu deildunum og virkisøkjunum. Stjóraskrivstovan hevur ein týdningarmiklan leiklut at samskipa dagligu umsitingarligu uppgávurnar hjá leiðsluni.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og er lønt í 4. lønarflokki. Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, lívsrensli og tilvísingum skulu sendast til:
Strandfaraskip Landsins
Stílað: Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn
og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. apríl 2007 kl. 12.00.

Til ber eisini at senda umsóknina til t-post: pah@ssl.fo.

Um tú ynskir nærri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Niels Juel Arge, virkandi stjóra á tlf. 543011 ella skriva til t-post: nja@ssl.fo

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Internet Sosialurin

www.sosialurin.fo